Music making a difference
Voices united against AIDS
ONE WORLD BEAT
Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
19. & 20. mars 2004

# Lena á veg við nýggari fløgu

**Í hesum døgum verður síðsta hond lagd á nýggju fløguna við Lenu Anderssen. Síðst í mars verða útgávukonsertir í Havn og Fuglafirði, har millum annað Óli Poulsen og onnur góð fólk skulu spæla undir**

Nýggja fløgan hjá Lenu Anderssen fær heitið Can't Erase It.

Tónleikurin á fløguni er melodiskur guitar popp-rockur, blandaðu við akustiskum tónleiki. Talan er um løg og tekstir, sum Lena Anderssen og Niclas Johannesen hava skrivað saman – tvey teirra saman við Óla Poulsen, sum eisini produserar fløguna.

Í august og september mánað í fjør vóru tey trý saman við James Olsen og Hans Poulsen tilsamans 18 dagar í Lundgaard Studio og gjørdu grundinnspælingar. Síðani hevur verið arbeitt í Mix'n'Fix Studio hjá Óla í Danmark og seinastu tíðina eisini í JakZac Studio í Føroyum.

Leygarkvøldið 27. mars verður so útgávukonsert í Norðurlandahúsinum. Við á konsertini vera somu tónleikarar, sum á fløgu innspælingunum. Haraftrat fara Ólavur Øster, Finnur Hansen, Kim Hansen, Laila Carlsen og Jákup Zachariassen eisini at manna bólkin hetta kvøldið. Kvøldið eftir verður farið til Mentanarhúsið í Fuglafirði.



*Hesi vera øll á palli 27. og 28 mars í ávíkavist Havn og Fuglafirði: Hans Poulsen, James Olsen, Lena Anderssen, Óli Poulsen, Niclas Johannesen avmyndað uttanfyri Lundgaard Studio í Danmark í september 2003*

# Russ Taff til Føroya

Tá ið G! festivalurin verður hildin í Gøtu í summar, verður kendi amerikanski gospelsangarin Russ Taff eftir øllum at døma eitt av nøvnunum, sum skal spæla á festivalinum.

Russ Taff hevur verið virkin innan gospeltónleikin í fleiri ártíggjund, og hann var ein av limunum í kenda bólkinum Imperials. Seinnu árini hevur hann havt ein solokarrieru, sum hevur givið honum fleiri Grammy-virðislønir.

Ætlanin er, at Russ Taff skal hava føroyskar tónleikarar afturat sær, tá ið hann fer at spæla á G! festivalinum.

# One World Beat í Fuglafirði



**Fyrsti globali tónleikafestivalurin verður eisini hildin í Føroyum og Mentanarhúsið í Fuglafirði er karmur um tiltakið, har tey yngru eiga fríggjakvøldið og tey meira tilkomnu eiga leygarkvøldið. Endamálið er at útvega pening til hjálpararbeiði**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroyar eru um vikuskiftið partur av alheims tónleikafestivali, sum fer av bakkastokki samstundis í umleið 40 londum, so talan er um einki minni enn eina stórhending.

Tað er FUT sum er høvuðsfyrireikari. Talan er um One World Beat festivalin, sum fyrstu ferð varð hildin í fjør í Sveits, men sum í ár er um allan heim. Endamálið er at útvega pening til hjálpararbeiði og í ár fer peningurin til Keep A Child Alive, ið letur til børn, sum hava Aids/HIV. Ósek børn, ið hava fingið sjúkuna í móðurlívi ella gjøgnum blóð.

Kaj Johannesen frá FUT sigur, at talan er um sjálvboðið arbeiði og hann fegnast um at bert vælvild er at merkja, hvar hann so vendir sær í samband við fyrireikingarnar.

Mentanarhúsið í Fuglafirði er karmur um tiltakið, sum verður fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Fríggjakvøldið er meira til yngra ættarliðið. Tá fara fleiri bólkar á pall; Deja Vu, All That Rain, 48 Pages, Speaker, Sic og DJ Kristin. Plakatir koma upp kring landið í hesum døgum, har luttakandi bólkarnir síggjast.

Kaj Johannesen frá FUT fegnast um, at tað stendur ikki á at fáa tónleikarar. Heldur er tað so, at teir standa í bíðirøð.

### Hugnin í hásæti leygarkvøldið

Leygarkvøldið eru Tey av Kamarinum, Martin Joensen, Ronnie Poulsen, Fluffy Toys, Ronnie og Sámal og Twilight á skránni. Har verður tónleika-café, har hugnin er í hásæti við kertuljósum á borðunum. Atgongumerki kunnu keypast í forsølu, t.d. á kunningarstovum og á Shell- og Statoilkstøðum, Og aftaná er dansur við eittnú Teimum av Kamarinum og Twilight. Fólk kunnu velja at stuðla, uttan at kenna seg noyddan at fara til tiltakið, siga fyrireikararnir um tiltakið við forsølu.

Bussar koyra í samband við One World Beat kvøldini í Fuglafirði.

Sosialurin hevur í bløðunum hósdagin og fríggjadagin prát við og lýsing av luttakandi bólkunum.

## Fakta

One World Beat er alheimsfestivalur, har øll arbeiðsorka er sjálvboðin og peningurin fer í ár til børn, ið hava Aids/HIV. Felagsskapurin Keep a Child Alive arbeiðir fyri hesum og fær peningin.

Føroyar eru partur av alheimsfestivalinum, sum fer av bakkastokki í 40 londum samstundis. Í Føroyum er Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um tiltakið 19. og 20. mars.

FUT er høvuðsfyrireikari. Til ber eisini at stuðla við at fara inn á heimasíðurnar hjá omanfyri nevndu felagsskapum.

Í Føroyum fara dugnaligir á pall í Fuglafirði um vikuskiftið; fríggjakvøldið er fyri yngraættarliðið og leygarkvøldið meira fyri tey tilkomnu, har hugnin er í hásæti við tónleikacafé og góðum dansi.

**Keep A Child Alive**
Keep A Child Alive hevur til endamáls at útvega lívsneyðugan heilivág til tær 3,2 milliónirnar børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS) í triðja heiminum. Hvønn minutt doyr eitt barn, tí at tað ikki hevur atgongd til lívsleingjandi antiretrovirala (ARV) viðgerð, og Keep A Child Alive hjálpir við at útvega antiretroviralan heilivág til tey børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS). www.keepachildalive.org

**One World Beat**
One World Beat er eitt non-profit-tiltak við høvuðssæti í Sveits. Endamálið er at savna samfelagsáhugaðar tónleikarar og vælgerð til frama fyri sosiala broyting; Tónleikur ið ger Mun!

One World Beat er eitt samtak av sjálvbodnum, og festivalurin loyvir tónleikarum og sjálvbodnum framat einum palli at bera sín boðskap fram, meðan teir styrkja tilvitanina hjá øllum Heiminum. Á hendan hátt útvegar festivalurin alneyðugan pening til at stuðla neyðstøddum. One World Beat samstarvar á hvørjum ári í felag við nógvar vælgerðarstovnar um hetta málið. www.oneworldbeat.org



MENNINGARSTOVAN
VINNU•TÍÐINDI
MARS-APRÍL 2004

# Nýggjur sáttmáli skal minka munandi um toll

***Føroyskir og russiskir myndugleikar eru um at fáa í lag ein sínámillum handilssáttmála sum peningaliga og umsitingarliga skal lætta um hjá vinnulívinum og økja um samstarv og handil millum londini.***

EIN SENDINEVND undir leiðslu av Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni skal í næstum til Moskva fyri at royna at fáa ein handilssáttmála millum Føroyar og Russland undirskrivaðan.

Ein sáttmáli ið gevur londunum sínámillum MFN (Most Favoured Nations) status hevur verið í umbúna, men beint sum hann herfyri skuldi undirskrivast varð tann russiska stjórnin skift út; nú verður so, samstundis sum altjóða fiskivinnu stevnan 'Fish 2004' fer fram, gjørd ein nýggj roynd at fáa sáttmálan til høldar.

»Vit vóna at fáa handilssáttmálan við Russland undirskrivaðan í apríl,« sigur Herluf Sigvaldsson, deildarstjóri á Uttanríkisdeildini hjá Løgmansskrivstovuni. »Tað var tann nýliga undanfarna stjórnin ið orðaði ta russisku síðuna av sáttmálanum og tað kann hugsast at tann nýggja stjórnin vil broyta okkurt punkt, ella kanska taka okkurt burtur, ella leggja okkurt afturat. Eg rokni tó við at sáttmálin í høvuðsheitum verður góðkendur sum hann er av tí nýggju stjórnini; spurningurin er bara hvussu langa tíð alt fer at taka…«

Sum skilst er innihaldið í sáttmálanum í stuttum at Føroyar og Russland geva hvør øðrum MFN status og tað hevur við sær at allur tollur á vørum og tænastum millum londini verður munandi minni.

»Lond hava vanliga ymisk stig av sínámillum tolling,« greiðir Herluf Sigvaldsson frá. »Tað verður talað um trý ymisk stig: Tað hægsta stigið, ið ofta inniber høga tolling, er tá ið eingin serligur handilssáttmáli fyriliggur; tað næsta er MFN stigið við lágari tolling, so sum tað er vanligt innan WTO og aðrar millumtjóða felagsskapir; tað triðja er tollfrælsi ella tollsamveldi við ongum tolli, so sum millum ES lond.«

»Tann sáttmálin vit vóna at fáa undirskrivaðan millum Føroyar og Russland í næstum gevur báðum londunum sínámillum MFN stig. Ætlanin er nevniliga at lætta munandi um hjá vinnulívinum í báðum londunum, soleiðis at samstarvið og handilin verður smidligari .« BÚI TYRIL

## Enn ber til at tekna seg

SAMAN VIÐ Russiska Konsulátinum í Føroyum, hevur Menningarstovan tikið stig til at luttaka á 'Fish 2004' í Moskva 21-24. apríl. Menningarstovan hevur bílagt eitt 24 fermetrar stórt framsýningar øki, sum verður føroyskur landsbásur; hetta økið er ætlað til fundarvirksemi.

Hetta er eitt einastandandi høvi til at knýta sambond við russiska vinnulívið. Russiska Konsulátið hjálpir við at knýta sambond við russisk reiðarí, og Menningarstovan veitir sambond við aðrar partar av russiska vinnulívinum ið kunnu hava áhuga fyri Føroyum og føroyskum vinnulívi.

Fyritøkur ið luttaka á landsbásinum fáa atgongd til skipaðan fundarbás, tulkahjálp russiskt/føroyskt og enskt/føroyskt, egið logo á básinum, í boði at vera við í felags lýsingum, møguleika at innbjóða til tiltak á básinum, navn og adressu við stuttari lýsing av fyritøkuni við í framsýningar katalog, og marknaðarupplýsingar um Russland (møguligt eyka gjald fyri upplýsingar frá donsku Uttanríkistænastuni kann koma afturat). Luttøkugjaldið íroknað hesar tænastur er fyribils sett til 12.500 krónur per fyritøku.

Ætla tit við so sigið okkum frá sum skjótast á tel. 353100. Freistin at tekna seg til luttøku á básinum er tann 18. mars. Tá vit endaliga hava skrásett luttakararnar, verður innkallað til fund. ANNLEYG LAMHAUGE

## 'Fish 2004—Industrial Fishery, Sea and Fish Products Processing'

*'Fish 2004—Industrial Fishery, Sea and Fish Products Processing'* fer fram í døgunum 21-24. apríl, og verður fyriskipað av Fiskivinnu Nevndini hjá russisku samveldis stjórnini í samstarvi við Amscort International.

http://www.amscort.ru/fish/eng

*Menningarstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum at stuðla menningini av føroyskum ídnaði, handverki og tænastuvirksemi við ráðgeving og upplýsing innan tøkni, búskap, leiðslu og útflutning og fyriskipan og luttøku í vinnumennandi átøkum innan nevndu øki. Virksemið hjá stovuni eigur í serligan mun at vera málrættað móti átøkum, sum fremja og menna útflutningsførleikan hjá føroyskum fyritøkum.*

**Til tykkara tænastu á Menningarstovuni:**



*Kjartan Kristiansen*
*kjkr@trade.fo*
*Inga Simonsen*
*inga@trade.fo*
*Áki Johansen*
*aki@trade.fo*
*Jákup Mørkøre*
*jm@trade.fo*
*Annleyg Lamhauge*
*annleyg@trade.fo*
*Aina L. Knudsen*
*aina@trade.fo*
*Steinbjørn í Dali*
*sd@trade.fo*
*Ribjørg Hentze*
*ribjorg@trade.fo*

# Stórir ordrar at vinna í Moskva

***Teir stóru møguleikarnir hjá føroyingum í samhandli við Russland fevna frá útflutningi av fiski yvir tænastur til innflutning av bíligum vørum.***



MARIA OLSEN

**Russisk sambond:** *Konsulin saman við Karl Erik Reynheim (v.m.) og Ivan Eginsson, á Skipafelagnum.*

MANGT BENDIR Á at tíðin nú er búgvin til at taka samstarvið við russar upp á eitt hægri stig. Tær føroysku fyritøkur ið halda seg hava sæð ljósið fyri eystan í glæmuni av prísverdum innflutnings møguleikum, ella halda seg kunna bjóða russum nyttigar vørur og tænastur, fáa nú høvi at gera vart við seg og knýta nýggj handilsbond í Moskva millum 20. og 24. apríl.

Síðani Skipafelagið Føroyar í 1940unum fór undir at veita russum havnaumboðan í Føroyum er nógv vatn runnið í sjógvin og tíðirnar hava ónoktiliga verið skiftandi. Royndirnar av hesum samstarvi hava tó verið javnt góðar og eru, um nakað, bara vorðnar betri við tíðini aftan á at kommunisman fall og vinnuligt frælsi gjørdist veruleiki í heimsins største landi; búskaparliga er 'bjørnin' av álvara við at vakna og gongdin tey seinnu árini ber greið boð um skjóta og áhaldandi menning í landinum.

*Árni Dam*, russiskur konsul í Føroyum, er leiðari á Agency deildini hjá Skipafelagnum. Hann hevur leingi verið heitur talsmaður fyri øktum samstarvi millum okkara pinkulingaland og risalandið fyri eystan, og vísir á at tann russiski marknaðurin er ovurhonds stórur í altjóða samanhangi, fyri ikki um at tala, eftir føroyskum máti.

»Tað hevði helst loyst seg hjá føroyingum at givið sær meiri far um møguleikarnar her,« viðmerkir hann. »Bæði hvat útflutningi og innflutningi viðvíkur, eru møguleikarnir nógvar ferðir størri enn hvat vit kunnu droyma um.«

**'Ikki torførar treytir':** Eitt er at Føroyar geografiskt liggja sera væl fyri í mun til russiska sjóvinnu, og kunnu tæna sum støð mitt á havleiðini til og frá Murmansk og Arkhangelsk, við øllum hentleikum til russisk skip at gagnnýta, so sum frystigoymslur fyri fisk, BIP (Border Inspection Point) fyri skrásetting av triðjalands vøru inn í ES, veitingar av olju, provianti og útgerð so sum trolum og reiðskapi, eykalutum og umvælingum, umframt heilsurøkt og túsund øðrum tænastum og vørum.

Samstundis stendur greitt at dygdin í nógvum bíligum vørum úr Russlandi livir upp til høg krøv—og at vit kunnu spara stórar upphæddir við at innflyta slíkar vørur. Tann russiska keypikraftin vísir seg eisini at vera nógv sterkari enn vit hava givið okkum far um; her kann bíða okkum ein meir ella minni ómettandi marknaður.

»Russarar handfara ógvuliga stórar nøgdir av vørum,« heldur Árni Dam fram, »og hetta er nakað sum gevur teimum møguleikar at spara kostnað í flutningi; tí kunna teir kanska gjalda eitt sindur meira fyri ávísar vørur.«

»Tak til dømis upsan… Hvussu illa hava vit ikki gramt okkum um prísirnar hesi seinastu árini! Onkrir russarar hava givið okkum ábendingar um at teir kunnu bjóða betri prís enn onnur á okkara leiðum; um teir vilja, kunna teir keypa so nógv sum føroyingar yvirhøvur klára at útvega av frystum upsa.«

**Deadline fyrsta dagin:** Fiskivinnustevnan 'Fish 2004' í Moskva 21-24. apríl kann sambært konsulin gerast eitt søguligt høvi hjá føroyingum at møta russiskum keyparum og seljarum.

»Hetta verður eitt stórt høvi,« roknar Árni Dam avgjørt við; »tað kann gerast byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari handils- og vinnusøgu. Øll tey stóru russisku reiðaríini Skipafelagið samstarvar við hava lovað at tey koma at vera til staðar í Moskva. Tey gleða seg til at møta føroyingum og eg rokni ikki við at samskifti verður nakar trupulleiki; har tað eingilska málið ikki røkkur, koma eisini tulkar við hollum kunnleika til russiskt og føroyskt at hjálpa til. Hinvegin kemur einki heilt av sær sjálvum og tað er upp til ein og hvønn sum hevur eina ætlan og eitt sindur av áræði at liggja framvið nú og nýta hetta høvi. Tað kunnu spyrjast góðir og stórir sáttmálar burturúr.«

Í sambandi við stevnuna skipar Menningarstovan fyri einari handilsferð til Moskva umframt einum felags føroyskum landsbási á framsýningini. Hóast áhugin fyri hesum tiltaki vísir seg at vera stórur millum føroyskar fyritøkur, ræður tað um at skunda sær nú hjá teimum ið kundu hugsað sær at fylgt við til Moskva men sum enn ikki hava boðað frá luttøku. Seinasta freist at tekna seg til luttøku á framsýningar básinum hjá Menningarstovuni er nevniliga 18. mars og til ferðina annars sum Flogfelag Føroya skipar fyri, 22. mars, upplýsir Annleyg Lamhauge á Menningarstovuni. BÚI TYRIL